gult cyan magenta svart

Íslendingar byggja ferjulegu til Norrönu

Sey›isfjar›ar Kommuna hevur gjørt avtalu um at byggja eina ferjulegu fyri 50-60 milliónir krónur til n‡ggju Norrönu. Hetta arbei›i› heldur fram hóast kreppuna hjá Smyril Line

NORRÖNA

Íslendingar hava fingi› at vita, at eingin vandi er fyri, at Norröna gevst at sigla til Íslands. Tí heldur Sey›isfjar›ar Kommuna eisini fram vi› arbei›inum at gera ferjulegu til n‡ggju Norrönu fyri 50 til 60 milliónir krónur.

Norröna er einasta ferjusambandi›, íslendingar hava vi› hini nor›urlondini. Tí gjørdust íslendingar rættuliga ørkymla›ir, tá ta› fríggjadagin fræKtist, at vandi var fyri, at t‡ska skipasmi›jan, sum byggir n‡ggju Norrönu, fór at ste›ga arbei›inum og møguliga eisini leggja hald á gomlu Norrönu.

Eingin vandi

Men skjótt fingu íslendingar at vita, at eingin vandi er fyri, at Smyril Line gevst at reka farlei›ina til Íslands.

Jónas Hallgrímsson, nevndarforma›ur í Smyril Line og stjóri á Austfar H/F, sum er umbo›ar Smyril Line í Íslandi, seg›i vi› íslendska útvarpi› fyrradagin, at ta› stó› væl til hjá Smyril Line, og teir trupulleikarnir, sum høvdu tiki› seg upp, fóru at ver›a ordna›ir.

Austfar, sum Jónas Hallgrímsson er stjóri fyri, er ein av íslendsku partaeigarunum í Smyril Line. Íslendingar eiga nevniliga 8 % í føroyska felagnum.

Sey›isfjar›ar Kommuna, sum er farin at byggja ferjulegu til n‡ggju Norrönu, er eisini partaeigari í Smyril Line.

Álit um fíggjarlógina li›ugt í dag

FÍGGJARLÓGIN

Fíggjarnevndin er li›ug vi› vi›ger›ina av fíggjárlógaruppskotinum fyri 2001, og ver›ur álit helst lagt fyri tingi› í dag.

Andstø›an og skrivarin hjá fíggjarnevndini sótu í gjár hvør í sínu lagi og skriva›u álit, og væntandi var, at bá›ir partar vóru klárir, árenn tingfundin í dag, so áliti› kundi b‡tast út til tingmenn, tá tingfundurin í dag var li›ugur.

Smyril Line stórliga brúk fyri n‡ggjum skipi

Smyril Line hevur brúk fyri at endurn‡ggja seg og fáa eitt n‡tt fer›amannskip, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line

Ta› er ein stórur trupulleiki hjá Smyril Line, um felagi› ikki fær endurn‡ggja seg, sigur Óli Hammer, stjóri

SMYRIL LINE
Ey›un Klakstein

Smyril Line er komi› í vandasjógv, sí›ani byggisáttmálin upp á n‡tt fer›amannaskip var› undirskriva›ur vi› t‡ska skipasmi›ju 27. juni.

Smyril Line hevur ikki klára› at goldi› seinasta avdráttin upp á byggingina, og nú krevur skipasmi›jan í Flensburg stóra fíggjarliga trygd frá Smyril Line, um arbei›i› skal halda fram.

– Vit skulu svara á middegi t‡sdagin, og okkara svar ver›ur, at vit kunnu ikki veita ta trygd, sum skipasmi›jan krevur. So ver›ur ta› upp til teirra at taka næsta stig, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line.

Hann leggur dent á, at Smyril Line fer ikki á heysin, og at felagi› ikki missir Norrønu.

– Stóri vandin hjá okkum er, um felagi› ikki fær endurn‡ggja seg. Ta› er eingin framtí› í Norrønu, og vit hava brúk fyri einum n‡ggjum skip, sigur Óli Hanner.

Hava dyrgt eftir almennum ve›haldi

Norrøna hevur siglt millum Føroyar og grannalondini sí›ani 1982. Skipi› er 27 ára gamalt, og næstu árini er vandi fyri, at skipi› fer at krevja kostna›armiklar ábøtur. Skipi› l‡kur tó øll krøv sum er.

– Slíkan sáttmála, sum vit gjørdu vi› skipasmi›juna í Flensburg, fáa vit ikki aftur. Hatta var eitt serstakliga gott tilbo›, sum vit ikki koma í nánd av, skuldu vit gjørt ein n‡ggjan sáttmála, sigur Óli Hammer.

– Skipasmi›jan hevur allatí›ina roynt at tr‡st okkum eftir størri trygd. Teir hava fegnir vilja› havt okkum at fáa landskassave›hald, men vit hava greitt teimum frá, at landi› blandar seg ikki uppí slíka skipabygging, sigur Óli Hammer.

Sambært stjóranum í Smyril Line var fyrr í ár fundur í Tinganes, har umbo› fyri t‡sku skipasmi›juna var vi›. Tá gjørdu bæ›i løgma›ur og landsst‡risma›urin vi› vinnumálum greitt, at landi› lat eingi ve›hald til skipabygging. Somu bo› fekk Smyril Line frá n‡ggja landsst‡rismanninum vi› vinnumálum fríggjadagin.

– Nú kunnu vit enn einafer› bo›a skipasmi›juni frá, at landi› letur einki ve›hald, og so ver›ur ta› upp til teir, hvat teir sí›ani skulu gera, sigur Óli Hammer.

Verri enn vænta›

Óli Hammer sigur, at orsøkin til, at Smyril Line ikki hevur fingi› goldi› seinasta avdráttin er, at felagi› hevur havt eitt av sínum minni gó›u árum í ár.

– Vit lí›a, sum so nógv onnur, undir hækkandi oljuprísinum, og vit hava havt færri fer›afólk í ár. Tíbetur sær ta› nú nógv betur út fyri næsta ár. Bíleggingarnar eru fleiri, og tí eru útlit fyri, at úrsliti› ver›ur betri næsta ár, sigur Óli Hammer.

– Um vit fram yvir kunnu halda sáttmálan, veldst sjálvandi um, hvussu ta› fer at ganga felagnum.

Smyril Line hevur fingi› til á middegi í dag at svara t‡sku skipasmi›juni. Tá skal felagi› veita eina trygd upp á 75 milliónir krónur, um arbei›i› at byggja n‡ggja skipi› skal halda fram.

Ta trygdina fær skipasmi›jan í Flensburg eftir øllum at døma ikki, og so er spurningurin, hvat næsti leikurin hjá t‡skarum ver›ur.

Áttatiárini vi›gjørd í dag

Sokalla›a grein 19 frágrei›ingin um áttatiárini ver›ur í dag vi›gjørd í tinginum

§-19 FRÁGREI›INGIN

Frágrei›ingin, sum ein løgtingsnevnd í fimm ár hevur gjørt um førda politikkin í áttatiárunum, kemur í dag til vi›ger›ar í løgtinginum.

Ta› er Finnbogi Ísakson, tingforma›ur, sum eftir áheitan hevur lagt uppskot til samtyktar fyri tingi›, um at taka til eftirtektar frágrei›ingina frá nevndini.

Fleiri orsøkir

Høvu›súrskur›urin í frágrei›ingini sta›festir, at fleiri orsøkir vóru til, at førdi politikkurin í áttatiárunum í byrjanini av nítiárunum førdi til svára búskaparliga kreppu.

»Føroysku politikararnir vóru ikki nóg dugnaligir. Teir lurta›u ikki eftir ávaringum frá rá›gevum og frá embætisverkinum.

Á fleiri t‡›andi økjum var lóggávan ógrei›, ófullfíggja› og fyrna› í 80-árunum, og ofta á›renn komi› var› var í 80-árini.

Landsumsitingin var veik. Henni vanta›i arbei›smegi, og á fleiri økjum vanta›i førleiki.

Málsvi›ger›in skuldi oftast umsita fleiri málsøki, enn hann var førur fyri. Málsvi›ger›in var ikki eins frá máli til mál og ikki nóg neyv. Tí gjørdist tapsvandin hjá landinum stórur, og munur var› gjørdur á monnum. Trupulleikar stó›ust av, at politikarar vóru partur av umsitingini.

Politiska eftirliti› – fíggjarnevnd, løgtingsgransko›arar, landsst‡rismálanevnd – sveik. Landskassin var› bundin uttan lógarheimild.

Fylgjurnar gjørdust álvarsamar: Milliardatap hjá landskassanum og álvarsamir trupulleikar hjá einstaklingum.

Ábyrgdin fyri álvarsligu skeivleikarnar og mistøkini í 80-árunum lá hjá politisku lei›sluni í 80-árunum, men eisini í 60- og 70-árunum, har tiltøk vór›u gjørd, i› fingu avlei›ingar í 80-árunum og fyrstu árini í 90-árunum. Leikluturin hjá stigtakarum, rá›gevum og peningastovnum skal eisini ver›a nevndur í hesum sambandi.«

Grein 19 nevndin sta›festir í høvu›sni›urstø›uni, at ábyrgdin fyri skeivleikunum lá hjá politisku lei›sluni. Men samstundis sta›festir hon, at orsøkirnar til kreppuna vóru fleiri.

Tá løgtingi› í dag fer at vi›gera frágrei›ingina, er ta› bert fyri at sta›festa ni›urstø›urnar hjá grein 19 nevndini. Uppskoti› hjá tingformanninum leggur nevniliga bert upp til, at tingi› skal taka frágrei›ingina til eftirtektar.

gult cyan magenta svart

Fred Garbe, stjóri á Flensburg-skipasmi›juni:

- Vit halda fram vi› byggingini av Norrønu

Stjórin á t‡sku skipasmi›juni, sum skal byggja Norrønu, roknar vi›, at Smyril Line ver›ur ført fyri at gjalda fyri n‡ggju Norrønu

SMYRIL LINE
Ey›un Klakstein

Stjórin á t‡sku skipasmi›juni, sum skal byggja Norrønu, Fred Garbe, var sjálvur í Føroyum og undirskriva›i byggisáttmálan. Hann tvíheldur um, at arbei›i› upp á n‡ggju Norrønu heldur fram sum ætla›

Stjórin á Flensburger Schiffbau-Gesellschaft (FSG) sigur seg hava álit á, at Smyril Line ver›ur ført fyri at gjalda fyri n‡ggju Norrønu.

– Vit halda fram vi› at byggja Norrønu sum ætla›, og vit rokna sjálvandi vi›, at Smyril Line fer at klára at gjalda fyri skipi›, sigur Fred Garbe, stjóri á skipasmi›juni.

Hann vil als ikki gera vi›merkingar til, hvat hendir, um Smyril Line ikki kann veita trygdina, sum skipasmi›jan hevur kravt til á middegi í dag.

Fred Garbe var sjálvur í Føroyum sí›st í juni mána›i og skriva›i undir byggisáttmálan upp á n‡ggju Norrønu. Sáttmálin ljó›ar upp á 660 milliónir krónur, og fyri hesa upphædd skal Smyril Line fáa eitt n‡móttans fer›amannaskip vi› øllum hugsandi hentleikum.

Vit halda fram

Ta› er nú sannlíkt, at byggingin av n‡ggju Norrønu ver›ur ste›ga›, tí skipasmi›jan í Flensburg hevur kravt fíggjarliga trygd frá Smyril Line, um arbei›i› skal halda fram.

Hesa trygd – sum er upp á 75 milliónir krónur – fer Smyril neyvan at klára at veita á middegi í dag, tá t‡ska skipasmi›jan hevur kravt svar.

Stjórin á skipasmi›juni vil einki siga um, hvat teir hava kravt frá Smyril Line, men hann váttar, at partarnir skulu tosa saman á middegi í dag.

– Eg haldi, at Smyril Line skal sleppa at svara í hesum máli. Okkara vi›merking er, at vit halda fram vi› byggingini eftir ætlan, og at vit rokna vi›, at Smyril Line fer at liva upp til sáttmálan, sigur Fred Garbe.

Arbei›i› komi› langt

Fámælti t‡ski stjórin vil als ongar vi›merkingar gera til, um skipasmi›jan fer at ste›ga byggingini av Norrønu, um Smyril Line ikki kemur vi› ein fíggjarligari trygd á middegi í dag.

Hann endurtekur bara, at skipasmi›jan er komi› langt vi› arbei›num upp á n‡ggju Norrønu, og at arbei›i› heldur fram sum ætla›.

Smyril Line hevur arbeitt vi› at finna pengar til trygdina, sum t‡ska skipasmi›jan krevur fyri at halda fram vi› byggingini, men tá landsst‡ri› seg›i nei til at veita ve›hald fríggjadagin, gjørdust møguleikarnir smáir fyri at finna eina loysn.

A›rir stórir føroyskir lánsveitarar hava eisini sagt nei til finna kekkhefti› fram, og tí ver›ur Smyril Line helst noytt at svara skipasmi›juni, at teir kunnu ikki veita ta trygd, sum skipasmi›jan krevur.

Sovjettiskur áhugi fyri Føroyum

Áhugavert hev›i veri› at gjørt meira burtur úr sovjettiskum áhugamálum í Føroyum, sigur Jákup Thorsteinsson, søgufrø›ingur

HERNA‹ARMÁL
Ey›un Klakstein

Føroyskir søgufrø›ingar hava seinnu árini endavent skjalagoymslum í vesturheiminum fyri at fáa vitan um føroysku stø›una í kalda krígnum.

Hetta hevur givi› úrslit í Svørtubók og seinni eini ískoytisfrágrei›ing til bókina, sum Jákup Thorsteinsson, søgufrø›ingur, hevur gjørt út frá skjølum í Føroyum.

– Ta› hev›i veri› áhugavert at gjørt meira burtur úr sovjettiskum áhugamáulm í Føroyum og tí vitan og innliti, sum russar uttan iva hava havt í føroyska samfelagi›, sigur Jákup Thorsteinsson í ískoytisfrágrei›ingini hjá sær.

Hann vísir á, at stø›ugi áhugin hjá Sovjettsamveldinum fyri Føroyum millum anna› kemur itl sjóndar í russiskari bla›grein frá 1983.


Grein í russiskum bla›i› vísir, at sovjettiskr áhugi var fyri vi›urskiftunum í Føroyum. Áhugavert hev›i veri› at fingi› meira at vita um hendan áhuga, heldur søgufrø›ingur.

Vita um mótstø›u

Greinin stó› í bla›num Krasnaja Zvezda í juni mána›i hetta ári›, og hon bygdi á uppl‡singar úr vinstravenda danska bla›num Land og Folk.

Í greinini ver›ur uppl‡st, at Føroyar og Grønland fáa alt størri leiklut í ágangandi herna›arligu ætlanini hjá NATO, sum bla›i› tekur til.

Bla›i› grei›ir millum frá, at NATO skal brúka 130 milliónir krónur til at n‡mótansgera herstø›irnar í Føroyum, og at meginparturin av hesum pengum skulu brúkast til stø›ina í Mjørkadali. Í Føroyum er stór mótstø›a ímóti hesum ætlaninum, ver›ur sagt.

– Ney›ugt er ikki at gera a›rar vi›merkingar til greinina, enn at hon vísir sovjettiskan áhuga fyri herna›arligu útbyggingunum í Føroyum, og at greinaskrivarin hevur vita› um føroyska mótstø›u móti herna›arligu útbyggingunum í Føroyum, skrivar Jákup Thorsteinsson í ískoytisfrágrei›ingini.

Eisini eystureftir

Jákup Thorsteinsson mælir í inngangum í frágrei›ingini til, at kanningar eisini ver›a gjørdar eystanfyri, so at javnvág fæst í søguskrivingina, og meira fæst at vita um áhugan hjá eystureuropeisku londunum fyri føroyskum vi›urskiftum.

Landsst‡ri› hevur í fleiri mána›ir ætla› at sett gongd á kanningar eystanfyri, men enn eru hesar kanningar ikki farnar í gongd.

Pengar eru játta›ir í hesum árinum til arbei›i›, og meira skal eftir ætlan játtan í komandi ári.

Anfinn Kallsberg seg›i fríggjadagin vi› Sosialin, at nú skal kanningararbei›i› eystanfyri í gongd.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.

Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.



299,-

Jógvan Arge